## Klaksvíkar Sjúkrahús
Tlf: 45 45 45 lokal 123
Fax: 45 73 63 · 700 Klaksvík

DEILD A | KIRURGISK SONGJARDEILD

# Sjúkrarøktarfrøðingur

Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í burðarfarloyvi at arbeiða 1,0 tíð í skiftandi vaktum, t.v.s. dag-, kvøld- og náttarvaktum og annað hvørt vikuskifti frá 01.03.2011 – 31.08.2011 ella eftir nærri avtalu.

**Førleikakrøv:**
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan kunnleika og royndir innan kirurgiska økið
- Góð samstarvsevnir

Lønar- og setunartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Nærri fæst at vita um starvið frá Monicu-Mari Ziska, virkandi deildarsjúkrarøktarfrøðingi á deild A, tlf. 454545 lokal 4555 ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu lokal 4606.

Umsókn saman við prógvi og autorisatión, verður at senda til: **Klaksvíkar Sjúkrahús**
att. Sjúkrahússtjórin
FO-700 Klaksvík

**Umsóknarfreist:** Mánadagin 21.02.2011

# VÁRFRAMSÝNING 2011

Í ár hava **Føroysk Myndlistafólk** bjóðað fimm íslendskum listafólkum til várframsýningina. Heiti á framsýningin í ár er
**JÁTTANIR**

**VÁRFRAMSÝNINGIN 2011** verður sensurerað og sett upp í samstarvi við íslendsku listafólkini og várframsýningsnevndina.

**TILFAR:** Listaverk kunnu latast inn sum: skulpturur, installasjón, málarí, grafikkur, foto, designlutur, arkitekturur, video, filmur, performance, animasjón, ljóð-list, alnóts-list, software-list, visuell poesi.

**STAÐUR:** Várframsýningin 2011 verður hildin í gamla partinum av Listaskálanum, í forhøllini og í einari pyramidu.

**INNLATING:** Digitalar myndir av ella greiðar skriftligar lýsingar av listaverkunum verða sendar **INNAN 4. MARS 2011**. Yvirlit, ið lýsir verk, navn og bústað, verður skrivað í oyðiblað, sum fæst á **www.mynd.fo** undir "Várframsýningin".

Oyðiblaðið við verkini sendast aftur til **varfram@gmail.com**. Eftir hetta fáa tey luttakandi boð.



**JÁTTANIR**

**SPURNINGAR** kunnu setast Ole Wich tlf. 27 38 40 ella á varfram@gmail.com

**LUTTØKUGJALD: Kr 300,-** ið fer til útreiðslur at sensurera framsýningina. Gjaldið verður sett á konto 6460-1585063.

**ÚRVAL:** Nevndin í Várframsýningini 2010 skilar sær rætt til frítt at velja millum tey verk, sum verða latin inn.

Hoyra verkini saman, og kunnu ikki lutast sundur, skal sigast frá um hetta, tá verkini verða latin inn. Hámark, 5 minuttir, er sett á video, film, animasjón og onnur verk, sum taka tíð at sýna fram.

Føroysk Myndlistafólk hava skipað fyri Várframsýningini í Listaskálanum síðani 1990. Í fjør vitjaðu 1200 fólk Várframsýningina 2010

**Sosialin**
-so eru tit við!

# Tvingsilssøla

Týsdagin tann 22. februar 2011, kl. 10.30, verður á dómaraskrivstovuni, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir 1/3 av matr. nr. 26a Haraldsund (innan og uttangarðsjørð). (AS nr. 2-115/2010).

Ognin er innan- og uttangarðsjørð. Innangarðsjørðin liggur í 3 lutum, uttangarðsjørðin er 5 gyllin fyri Sunnan.

Tvingsilssølan er umbiðin av Klett advokatum, Julianna Klett, advokati, Bringsnagøta 21, 100 Tórshavn, tlf. 311744, (j.nr. 89296), sum kann geva nærri upplýsingar.

Søluupgerð kann fáast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

Sosialurin 341800

**KLETT ADVOKATAR**
JULIANNA KLETT · JÓHAN J. LAMHAUGE

Bringsnagøta 21 · Boks 62 · 110 Tórshavn
**www.klett.fo**

# Innbjóðing til evnisdag um Parkinsonsjúku

**Skipa verdur fyri evnisdegi um parkinsonsjúku, fríggjadagin 18. februar kl. 09.00 – 13.30 á Hotel Hafnia. Tove Henriksen, yvirlækni í neurologi á Bispebjerg sjúkrahúsi undirvísur.**

**Luttøkugjaldid er 200 kr. fyri limir og 350 kr. fyri onnur • Ábit er vid í prísinum.**

**Gjaldast skal á konto 6460-1633831 í BankNordik**
**Seinasta freist fyri tilmelding er týsdagin 8. februar 2011.**

**Tilmelding á tlf. 233899 ella teldupost:**
**kristiannamichelsen@hotmail.com**
**hildebjorg@olivant.fo**

Sosialurin 341800

**Parkinsonfelagið**
WWW.PARKINSON.FO

# Frá S & K felagnum

Aðalfundur felagsins verður í húsinum hjá S & K felagnum, Traðarvegur 20, Tórshavn, leygardagin 19 februar 2011 kl. 19:00

**Dagsskrá sambært lógum felagsins:**
1. Frásøgn formansins frá farna árið
2. Roknskapur til góðkenningar
3. Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum
4. Val av formanni
5. Innkomin uppskot
6. Ymiskt

**Nevndin í S & K felagnum**

S&K

Tekniski Skúlin Klaksvík

# LÆRARI TIL SJÓVINNUÚTBÚGVINGAR Í KLAKSVÍK

**Søkt verður eftir undirvísara at byrja skjótast tilber, men vit bíða fegin eftir tí rætta.**

**Starvsinnihald:**
- Undirvísa í trygd á sjónum. Undirvísingin fevnir um bæði ástøðiliga frálæru og venjingar í at nýta bjargingar- og eldsløkkingarútgerð v.m.
- Undirvísing í øðrum sjóvinnuútbúgvingum
- Vera við til at menna og gera frálærutilfar í samsvar við altjóða krøv og tørvin hjá vinnuni
- Vera við til vanligt viðlíkahaldsarbeiði á venjingarstøðini og aðrar fyrifallandi uppgávur

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal hava
- Lokið prógv sum maskinmeistari ella navigatørur við 3 ára útbúgving ella hava drúgvar starvsroyndir við neyðugari eftirútbúgving innan trygd umborð á skipum, boripallum ella flogferðslu, ið kann javnsetast
- Fyrimunir er, um umsøkjarin hevur undirvísingarroyndir frá t.d. sjó-, frálandavinnu ella loftferðslu
- Kavaraprógv ella aldur og heilsu til at taka prógv sum kavari
- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góð samstarvsevni og førleika til sjálvstøðugt arbeiði
- Kunnleika til samskiftis- og kunningatøkni.

Tann, ið settur verður, skal vera til reiðar at taka útbúgvingar og eftirútbúgvingar, sum eru viðkomandi fyri starvið.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag, www.lnd.fo
Setanarøkið fevnir um sjóvinnu skúlarnar í Klaksvík og Tekniska Skúla í Klaksvík.

**Umsóknir:**
Umsóknarfreistin er 22. februar 2011, kl.16.00.
Umsókn við ljóstøku av prógvum, yvirlit yvir royndir og møgulig viðmæli skulu sendast:

Á teldupostadressu: runih@tsk.fo

ella

**Tekniska Skúla í Klaksvík**
Postboks 20
FO-700 Klaksvík
stílað: Rúni Heinesen, skúlastjóri

**Nærri upplýsingar** um starvið fáast við at venda sær til Hanus Kjølbro, deildarleiðara, tlf. 224464 ella hanus@klaknav.fo

*Lýsingin sæst eisini á www.seasafe.fo*

www.ebenezer.fo

**SUNNUDAGSSKÚLIN**
í Ebenezer er hvønn sunnudag kl. 12.00
**Øll eru hjartaliga vælkomin!**

